## Vánaligur fiskur

Ein kanning hjá danska Matvørustýrinum vísir, at umleið ein triðingur av tí feska fiskinum, sum verður seldur í donskum handlum, er so vánaligur, at hann er ikki egnaður sum handilsvøra. Matvørustýrið sigur kortini, at tað er ikki heilsuskaðiligt at eta fiskin, men at hann er ikki so góður, sum hann eigur at vera. Handlarnir umbera seg við, at teir vita ikki við vissu, hvussu gamal fiskurin er, tí tað stendur ikki, nær hann er fiskaður.



# Vit hava fingið knívin á barkan

**Tvørafólk eru bæði ørkymlað og vónbrotin tí tey síggja øll tekin í sól og mána um, at flakavirkið á Tvøroyri heldur uppat**

ARBEIÐSPLÁSS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Arbeiðsfólkið hjá Fiskavirking á Tvøroyri varð ikki stórt klókari á fundinum við leiðsluna í gjár. Men tey halda, at tað er greiðari enn nakrantíð, at flakavirkið á Tvøroyri letur aftur*

- Vit eru ørkymlað og vónbrotin og eftir mínum tykki hava vit fingið knívin á barkan.

Arbeiðsfólkið hjá Fiskavirking á Tvøroyri heldur ikki, at tey eru vorðin stórt klókari eftir fundin í gjár við leiðsluna hjá Fiskavirking í Suðuroy.

Fiskavirking hevur gjørt greitt, at flakavirkið skal flytast til Vágs, har virkið er bæði størri og betri enn tað á Tvøroyri.

Tí vildi arbeiðsfólkið hjá Fiskavirking á Tvøroyri hava fund við leiðsluna fyri at fáa at vita, hvørjar framtíðarætlanirnar eru og serstakliga hvørjar ætlanirnar eru við flakavirkinum á Tvøroyri.

Men bæði Enok Borðá í arbeiðsmannafelagnum Fylking og Sunrid Vang í Fiskepigernes Fagforening halda, at tey blivu ikki nógv klókari av fundinum.

- Vit fingu at vita, at ætlanin er at flyta fiskaarbeiðið til Vágs. Men tað bar ikki til at fáa heilt greið boð um, hvussu verður við virkinum á Tvøroyri, siga tey.

Tey eru kortini bæði samd um, at sum landið liggur nú, talar alt fyri, at virkið á Tvøroyri verður stongt.

Samstundis hava tey fingið at vita, at í Vági verður eisini brúk fyri arbeiðsfólkinum á Tvøroyri

- Hjá okkum á Tvøroyri sær ikki gott út. Vit hava fingið knívin á barkan: Antin koyra vit til Vágs til arbeiðis, ella missa vit arbeiðið. Vit hava onki val, sigur Sunrid Vang.

- Hinvegin veit eg ikki, hvat fakfeløgini í Vági siga til at fáa innrás av Tvøroyri, leggur hon afturat.

- Men vit hava fingið at vita frá leiðsluni á Fiskavirking, at ætlanin er ikki at gera mun á, hvar fólk búgva, leggur hon afturat.

Hvussu nógv tvørafólk eru sinnað at koyra til Vágs at arbeiða, veit hon ikki.

- Eg haldi, at eftir fundin í dag er tað enn klárari fyri mær, at virkið á Tvøroyri letur aftur, sigur Enok Borðá.

### Mótstríðandi boð

- Trupulleikin er, at vit alla tíðina hava fingið mótstríðandi fráboðanir frá leiðsluni á Fiskavirking.

Tað sigur Enok Borðá.

Hann sipar til, at viðhvørt hava tey fingið at vita, at flakavirkið skuldi flytast til Vágs og at virkið á Tvøroyri skuldi brúkast til onnur endamál.

- Men aðrar tíðir hava vit hoyrt graml um, at virkið á Tvøroyri skal mestsum niðurleggjast.

Hann heldur ikki at feløgini fáa gjørt nakað við støðuna, men hann vildi ynskt, at feløgini vórðu betri kunnað.

- Fiskavirking skuldi beinanvegin boðað greitt frá, hvørjar ætlanirnar eru, tí so høvdu fólk havt møguleikan at lagt til rættis eftir tí og kanska funnið sær annað arbeiðið.

- Sum støðan hevur verið, hava fólk aftra seg við at fara aðrar vegir, tí tey hava havt eitt gott arbeiðspláss á Tvøroyri.

- Tað, sum eg haldi er mest átaluvert, er, at vit ikki hava fingið greið boð, tí tað er helst torført at blanda blanda seg upp í, hvussu eitt privat virki, sum Fiskavirking, leggur til rættis.

Enok Borðá ivast eisini í, hvussu nógvum tvørafólkum, pláss verður fyri í Vági, tí honum er komið fyri oyrað, at fólk úr syðru helvt, sum vóru áhugað at arbeiða í Vági, sluppu ikki framat, tí tað var ov lítið arbeiðið.

Men er nakað í vegin fyri at koyra til Vágs til arbeiðis. Tað verður ikki so langt, tá ið koyrandi verður ígjøgnum Hovstunnilin?

- Nei, tað er væl ikki so langt, men tað ber heldur ikki til at tvinga fólk til Vágs. Ivaleyst fara summi, men onnur ikki hava hug til tað.

Men umboðsmaðurin fyri Fylking heldur, at ein trupulleiki, sum kann vísa seg, er, at Fiskavirking at arbeiða í tveimum skiftum í Vági. Og tað kann elva til trupulleikar, tí talan er um fólk, sum eiga børn og tað kann verða torført at hava óvanliga arbeiðstíð, tí tað kann knípa við barnaansing.

Les meiri á síðu 12.

# Vilja heldur royna at tosa enn at hótta

**Tvøroyrar Býráð fer at royna at fáa eitt uppbyggjandi samskifti við Fiskavirking um virkið á Tvøroyri**

ARBEIÐSPLÁSS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sjálvandi er tað harmiligt at verður flakavirkið á Tvøroyri niðurlagað. Men nú er ikki nógv, politikarir kunnu gera við tað.

Borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, harmast um, at Fiskavirking ætlar at minka virksemið á Tvøroyri.

- Men nú er Fiskavirking privat fyritøka og sostatt hava politikarar onga ávirkan á teirra avgerðir.

Borgarstjórin sigur, at tá ið Fiskavirking var alment, høvdu politikarar møguleikan at ávirka støðuna. Eitt nú kundu teir gjørt av, at virkini kring landið skuldi verðið seld lokalum kreftum.

- Men tí møguleikanum tóku politikarar ikki av og nú er ov seint, sigur Kristin Michelsen.

Kortini sigur hann, at hetta er eitt mál, sum býráðið á Tvøroyri ætlar at tosa við Fiskavirking um.

- Vit samskifta við Fiskavirking av og á og eisini í hesum máli eru vit sinnað at fara undir eitt jaligt samskifti við fyritøkuna um framtíðina á Tvøroyri.

- Ein møguleiki kann vera, at Fiskavirking vil selja virkið til lokal áhugamál ella at Fiskavirking og lokal áhugamál ganga saman um at reka virkið víðari.

Annars stendur flakavirkið á grundstykki, sum er leiga frá kommununi. Í leigusáttmálanum stendur, at hevur arbeiðið ikki verið á virkinum í tvey ár, kann sáttmálin sigast upp við eitt árs ávaring. Og tað eru tey, sum halda, at letur Fiskavirking virkið á Tvøroyri aftur, eigur Býráðið rætt og slætt at siga sáttmálan upp um tvey ár og so kann Fiskavirking pakka seg vekk so at onnur sleppa framat økinum.

Men tað er ikki ein møguleiki, sum Tvøroyrar Býráð arbeiðir við.

- Vit vilja heldur tosa við Fiskavirking enn at hótta teir við uppsagnum. Vit vilja fegin tosa við Fiskavirking um, hvørjar ætlanir tey hava, heldur enn at hótta tey, sigur Kristin Michelsen.

Hann leggur afturat, at ein trupulleiki er helst eisini tann, at tað er rætt og slætt ov lítil fiskur.

Les meiri á síðu 12.